# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Endamálið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymsar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

## Árið 2013

Stýrið fyri Vinnuframa hevur lagt dent á at stuðla sølufremjan í útlondum, vinnulívsmennig, ferðavinnutænastur og kreativar vinnur í 2013.

Eins og undanfarna ár, verður raksturin støðugt tillagaður, soleiðis at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti, metir stýrið, at stuðulin verður betri gagnnýttur til mennandi verkætlanir, samfelagnum at frama. Nýggja skipanin, har ið samskipari grunnsins er eitt bindilið í millum stýrið og umsøkjaran, ger at umsøkjarin fær skjótari viðgerð og røttu ráðgevingina viðvíkjandi møguleikanum við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur eins og undanfarin ár umsitið skipasmiðjustuðul og hevur verið umboð í norðurlendskum samstarvi innan kreativar vinnur undir KreaNord. Eins og undanfarna ár, hevur Vinnuframi umsitið invest.fo og svarað fyrispurningum frá ymsum heimspørtum um fíggjarlig og skattlig viðurskifti í Føroyum.

Innrættingin av Granskarasetrinum iNOVA er liðug, og veruligur rakstur er komin í Granskarasetrið. Stovnsfæið í Vinnuframa varð niðurlagað við 6,6 mió.kr., ið eru ætlaðar til útvegan av granskingartólum til iNOVA. Fyri at tryggja, at tólini skuldu vera gagnnýtt best møguligt, varð avgjørt at lýsa eftir granskingarverkætlanum, ið tørvaðu tól. Inn komu fleiri áhugaverdar umsóknir til granskingarverkætlanir og útveganin av tólum er í gongd.

Rentuinntøkurnar vóru 414 tkr. í 2013 í mun til 809 tkr. í 2012

Vinnuframi hevur í 2013 viðgjørt 47 umsóknir, harav 34 umsóknir vórðu játtaðar. Í stuðli vórðu veittar 2.408 tkr. brutto, meðan 216 tkr. vórðu afturførdar.

Eginognin við árslok var 38.264 tkr., herav er stovnsfæið 22.879 tkr. Broytingin í stovnsfænum kemst av eini niðurlaging á 6,6 mió.kr. til útvegan av tólum til Granskarasetrið.

Við árslok 2013 er tøki peningurin 27.055 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul er 3.323 tkr.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Framtíðin

Vinnuframi hevur gjørt stuðulsskipanirnar einfaldari í 2014. Frá at hava 10 ymiskar stuðulsskipanir hava vit nú 4, nevniliga íverksetan, ráðgeving, menning og søla. Nýggja skipanin fer at lætta munandi um hjá umsøkjarum at søkja stuðul úr Vinnuframa. Kortini fer umsitingin at kunna samanbera nýggju og gomlu skipanirnar soleiðis, at munagóð hagtøl kunnu gerast.

Stýrið fyri Vinnuframa fer í 2014 at leggja dent á at játta stuðul til menning av nýggjum vørum og sølufremjandi tiltøk. Vinnuframi arbeiðir støðugt við at gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur í 2014.

Afturat høvuðsvirkseminum, sum er at stuðla tí góða hugskotinum, átekur Vinnuframi uppgávur frá Vinnumálaráðnum, m.a. umsiting av Invest.fo og virkar sum myndugleikaumboð í norðurlendskum samstarvi innan kreativar vinnur.

Niðanfyri er lýsing av tveimum verkætlanum, ið fingu stuðul frá Vinnuframa í 2013.

### Umsøkjari:

Simprentis P/F til vørumessu GetEnergy Global Event 2013.

### Lýsing:

Simprentis P/F er fyritøka, við sergrein innan menning av simuleringsundirvísing. Millum annað mennir og veitir Simprentis skeið til altjóða oljuídnaðin grundað á lærusimuleringina OilSim, har luttakarnir læra ímeðan tey kappast og samstarva.

Simprentis hevur síðan byrjan í 2002, flutt seg inn fleiri marknaðir víða um í heimi. Fyritøkan er vaksin frá at vera ein lítil fyritøka við einstøkum starvsfólkum til at vera ein miðalstór tænastufyritøka við væl útbúnum starvsfólkum. Vøruúrvalið er eisini ment nakað síðan byrjan og umfatar nú eisini skipanir til fíggjarvinnuna og gengranskingarvinnuna. Høvuðsproduktið hjá Simprentis er OilSim lærusimuleringin, ið vendir sær til oljuvinnuna.

### Stuðul:

Vinnuframi játtaði 30. januar 2013 at stuðla Simprentis P/F.

### Endamál:

Fyri Simprentis er GetEnergy ein hin týdningarmiklasta messan at luttaka á. Talan er um eina av størstu messunum innan hesa vinnugrein, har fokus er á útbúgving og menning av starvsfólkum í oljuvinnuni. Nógvir verandi kundar og møguligir nýggir kundar luttaka á messuni, og gevur hetta tí stóran møguleika fyri bæði at selja og marknaðarføra seg fyri nýggjum kundum, men sanniliga eisini at varðveita og styrkja um tey sambond, sum longu eru – og sum í síðsta enda eisini er stórur partur av marknaðarføringini hjá Simprentis P/F.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Fyri Simprentis P/F eru tað serliga tveir hættir at selja sína tænastu á eini messu. Ein háttur er at møta verandi og møguligum nýggjum kundum á básinum og vísa vøruna, og er tað m.a. her at samstarvssamráðingar byrja. Hin hátturin er at fáa kundarnar til sjálvar at royna skipanina og verður hetta gjørt við seminarum og work-shops. Á GetEnergy 2013 var bæði skipa fyri seminarum og work-shops, samstundis við at onnur vóru á básinum og tóku í móti kundum.

Endamálið við messuluttøkuni var sostatt bæði at marknaðarføra og selja Simprentis fyri nýggjum kundum og skapa nýggjar sambond, umframt at betra um verandi sambond.

**Úrslit:**

Luttøkan á GetEnergy eydnaðist væl. Áhugin var stórur fyri Simprentis, ið hevði nógvar vitjanir á básinum og luttakandi á seminarunum og work-shopunum. Vitjanirnar umfataðu bæði verandi kundar og nýggj sambond. Sambond vóru skapt og avtalur gjørdar, eitt nú byrjaðu samráðingar ímillum Simprentis og World Society of Petroleum Engineers ísbv GetEnergy 2013. Umframt nýggju sambondini, frøist Simprentis serliga um nýggju útbreiðslu sambondini, ið skapt vóru í Mið- og Fjareystri. Hesir marknaðir eru truplir at røkka, og hava teir eisini verið veikasta liðið í dekninginum hjá Simprentis higartil. Krøvini, sum marknaðirnir seta til veitarar, eru høg, bæði hvat viðvíkur veitingartrygd og góðsku.

**Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:**

Simprentis P/F søkti um stuðul ígjøgnum stuðulsskipanina Vørumessur. Endamálið við skipanini er at stuðla føroyska luttøku á vørumessum og framsýningum uttanlands. Eitt nú fyritøkum, sum vilja styrkja støðu sína á útlendska marknaðinum, og fyritøkum, feløgum og stovnum, ið skipa fyri framsýningarluttøku uttanlands.

**Umsøkjari:**

Spf. Kelduvatn til uppbyggjan av søluneti í Danmark, Týsklandi og Bretlandi til vøruna Basalt.

**Lýsing:**

Spf. Kelduvatn varð sett á stovn í 2010 við tí endamáli at gagnýta vatnkelduna úr Sumbiartunnlinum til vinnuligt endamál, serliga við útflutningi fyri eygað.

Síðan felagið varð stovnað, hevur arbeitt verið við at menna eina eksklusiva vøru við drekkivatni á glasfløsku, og 5. september 2013 kom so Basalt á marknaðin. Talan er um eksklusivt sniðgivnar hálvlitursfløsku við vatni við og uttan brús. Sniðið er basalt, reint og minimalistiskt og talar tað júst til high-end kundaskarðan. Aftur við fløskuni fylgir eitt leysablað, har søgan um óspiltu Føroyar verður løgd fram, saman við jarðfrøðiligu umstøðunum, ið gera Basalt til nakað serligt. Hetta ger søguna sum kundin keypir meira spennandi og dragandi, hetta at tað er náttúran, sum sjálv borðreiðir teimum reina og fríska vatnið, sum tey kunna njóta á e.n. matstovuni tey sita á.

Basalt er longu at fáa á matstovum í London og Keypmannahavn, har móttøkan hevur verið ómetaliga góð. Hetta hevur verið virkandi til, at vónirnar um at fáa fótin innum á hesum spennandi marknaði, er bæði størri og meira sannlíkar.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

**Stuðul:**

Vinnuframi játtaði 26. septembur 2013 at stuðla Spf. Kelduvatn, Basalt.

**Endamál:**

Visiónin hjá Spf. Kelduvatn hevur frá byrjan verið at menna eina góðskuvøru, ið setur føroyskt kelduvatn á heimskortið millum sonevndu premium brands á altjóða drekkivatns-marknaðinum.

Spf. Kelduvatn hevur verið í samband við serfrøðingar á drekkivatns-marknaðinum, ið hava víst á, at Basalt hevur ein møguleika at gera seg galdandi í tí betra endanum av marknaðinum.

Kappingarneytarnir eru fáir, men stórir. Og tí eru góð sambond og kundarøkt vegurin fram. Tað er av týdningi at sleppa innum hjá fyritøkunum innan HORECA sektorin, ið er eyðkendur fyri at seta góðsku, veitingartrygd og uppruna høgt.

Eftir at fyrstu avtalurnar eru gjørdar við matstovur í Keypmannahavn og London, er endamálið við átakinum at tryggja grundarlagið enn meira við at uppbyggja sær eitt sølunet í London, Keypmannhavn og Týsklandi. Hetta við at luttaka á messum, vitja møguligar nýggjar kundar og tryggja, at sølutilfar er tøkt stuðlar undir vitjanir og messuluttøku.

**Úrslit:**

Enn ber ikki til at staðfesta endaliga úrslitið, eftirsum hetta er ein framhaldandi gongd og arbeiði. Men á vørumessuni í Køln, fekk Spf. Kelduvatn samstarvsavtalu í lag við týskan umboðsmann, ið hevur tikið Basalt við í sítt vøruúrval. Og við hesum er ítøkiligt úrslit komið burturúr, nevnliga, at Basalt er at fáa á 2 stjørnaðu Michellin matstovu - eitt beinleiðis prógv um, at avgerðin at fara eftir high-end marknaðin var ein røtt avgerð.

**Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:**

Spf. Kelduvatn søkti um stuðul í gjøgnum stuðulsskipanina Sølufremjandi tiltøk. Endamálið við skipanini er at stuðla føroyskum fyritøkum, ið vilja styrkja støðu sína við at marknaðarføra seg og sínar vørur/tænastur uttanlands.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

### Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu seks árini (í túsund krónum):




| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 2.700 | 1.800 | 667 | 258 | 25 | 0 | 5.192 |
| Menning | 1.953 | 1.341 | 719 | 885 | 704 | 396 | 5.998 |
| Marknaðarføring | 1.501 | 2.563 | 2.057 | 1.109 | 1.522 | 1.492 | 10.244 |
| Aðrar | 504 | 215 | 337 | 434 | 235 | 520 | 2.298 |
| | **6.658** | **5.919** | **3.780** | **2.686** | **2.486** | **2.408** | **23.732** |

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Samlað fyri árini 2008-2013 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

